# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tá ítróttin verður gloymd




*Túsundtals fólk savnaðust á gøtuni í Vezprem at minnast Marian Cozma*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Skelkurin er stórur í Ungarn og Rumenia, eftir at 26 ára gamli rumenski landsliðsspælarin, Marian Cozma varð myrdur í Ungarn. Tveir av liðfeløgum hansara vórðu eisini álvarsliga løstaðir av drápsmonnunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hendingin fór fram í Vezprem, sum liggur sunnanfyri Budapest, mánakvøldið.

Fleiri av spælarunum hjá MKB-Vezprem vóru farnir ein túr í býin, eftir at ein teirra hevði hildið barnaføðingardag. Og tað var á einum náttklubba, at róliga náttin gjørdist til eina óhugnaliga marru.

Marian Cozma var á dansigólvinum saman við gentu síni, tá ein bólkur upp á 30 mans fór at gera um seg í náttklubbanum.

- Eingin av okkara spælarum gjørdi nakað um seg, men brádliga varð Cozma álopin, sigur Akos Hunyadfalvy, forseti í MKB-Veszprem.

Cozma varð knívstungin í hjartað fleiri ferðir, og hóast hann varð fluttur á sjúkrahús alt fyri eitt, máttu læknarnir staðfesta, at lívið stóð ikki til at bjarga. Við sínum 212 sentimetrum var Cozma ein spælari, sum fólk løgdu til merkis. Hann spældi við í HM-kappingini, sum varð spæld fyri tveimum vikum síðani, og eitt av feløgunum, sum nú royndi at fáa undirskrift hansara, var spanska Barcelona.

Tveir av liðfeløgunum hjá Cozma vórðu eisini álvarsliga løstaðir í hendingini. Kroatiski málverjin, Ivan Pesic, varð lagdur undir skurð, og er annað nýra hjá honum tikið burtur. Og serbiski Zarko Sesum, sum varð sparkaður til óvit, breyt kjálkabeinið.

Hendingin hevur sent ein skelk ígjøgnum alt ungverska samfelagið. Tibor Draskovics, lógarmálaráðharri, kallar hetta fyri eitt álop á samlaða ungverska samfelagið, og framman fyri høllina, har Veszprem spælir sínar heimadystir, savnaðust túsundtals áskoðarar í gjárkvøldið.

Tað eru serliga tríggir mans, sum eru undir illgruna fyri drápið. Tveir teirra eru nú handtiknir í Wien.

# Mest sum javnstøða

**Átta kvinnur og níggju menn tóku um vikuskiftið lut á B1-venjaraútbúgvingini hjá FSF**

FÓTBÓLTUR
*www.football.fo*

FSF hevði bjóðað til venjaraskeið serliga fyri kvinnur, og 9 kvinnur kring landið tóku av tilboðnum um skeiðið, ið er tað fyrsta í venjaraútbúgvingini hjá FSF.

- Tað er ikki tí, at hetta skeiðið er øðrvísi enn hini B1 skeiðini, vit halda. Men vit hava valt at hava eitt serligt skeið fyri kvinnur, tí vit ynskja at fáa fleiri kvinnur at taka á seg venjarauppgávur í feløgunum, og royndirnar vísa, at tað er lættari at fáa kvinnurat koma á skeið, um tær vita at aðrar kvinnur eru við eisini, sigur Virgar Hvidbro, sumerútbúgvingarsamskipari hjá FSF.

Við tað at eftirspurningurin at koma á venjaraskeið er rættiliga stórur, sluppu 8 mans á bíðilista eisini við til skeiðið, sum varð hildið farna vikuskifti.

Komandi vikuskiftið verður aftur eitt B1 skeið, og tað hevur leingi verið fullteknað.

B1 venjaraskeiðið tekur útgangspunkt í venjing av smáum børnum. Evnið er grundleggjandi venjing og barnafótbóltur. Til praktisku venjingarnar á Niðara Vølli í Gundadali høvdu feløgini AB, B36 og HB funnið børn og ung, ið vóru sinnað at gera eftir boðunum hjá komandi B1-venjarunum.

## Bestur í Afrika

Emmanuel Adebayor úr Togo, sum spælir við Arsenal, varð í gjár kosin ársins fótbóltsspælari í Afrika í 2008. Fýra ferðir á rað hevur Adebaoyr vunnið heitið sum besti spælarin í Togo, og tí var talan sjálvandi um heilt serliga løtu hjá Adabayor. Næstir honum í atkvøðugreiðsluni komu Mohamed Aboutrika úr Egyptalandi og Michael Essien úr Ghana.

## Sendast í skammikrók

IFAB, sum er samstarvsfelag millum bretsku fótbóltssambondini og FIFA, fer á komandi fundi sínum, sum verður tann 28. februar, at tosa um møguleikan at herða revsingina fyri gul kort. Hetta við at nýta tíðaravmarkaða útvísing, soleiðis sum tað verður gjørt í eitt nú hondbólti. Umframt hetta fara limirnir í IFAB eisini at tosa um møguliekan at leingja hálvleiksssteðgin og at hava fýra útskiftingar heldur enn tríggjar.

## Notodden vil hava Jónas

Norska felagið Notodden er áhugað í gera sáttmála við føroyska landsliðsspælaran Jónas Tór Næss.

Notodden er felagið, har Símun Samuelsen áður hevur roynt seg, og nú eru norðmenninir sinnaðir at fáa ein annan føroyskan spælara til felagið.

Tað er Jónas Tór Næss, sum í fjør spældi fyri NSÍ. Jónas hevur áður roynt seg í donskum feløgum.

- Vit hava verið í sambandi við umboðsmannin hjá Jónas, men enn eru vit ikki komin til nakra niðurstøðu, sigur Kjetil Kvaale, dagligur leiðari í Notodden, við Telemarksavisa.